

# Samkomublaðið fyri juni/juli

# 2015

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510



## Gud talar

*Anja Bjerkenes*

Vit hava havt nakrar vitjanir av evangelistum og profetum í samkomu okkara í seinastuni. Stephen og Cindy Seabury, Steve og Annika Everett, Linda Lee Ott og Móses Hansen. Haraftrat hevur Ellen Jensen verið á Aglow og á kvinnumøti.

Í stuttum tosaði Steve Seabury um, at hann sá Guds favør yvir okkara land og fólk, men at samkoman er sum ein sovandi risi. Men vit eru í ferð við at vakna til at stríða ein andaligan bardaga.

Í stuttum hevur Stephen Everett arbeitt við at kveikja upp náðigávurnar og fáa tær at virka okkara millum. Vit skulu útrustast og fara út at boða evangeliið.

Móses Hansen áminti um at vera ein góður angi Kristusar. Ikki við at liva upp til nakað, men við at brúka tíð saman við Jesusi. Á tann hátt kann Hann skína ígjøgnum okkum, og vit verða ein góður angi Hansara, menniskjum til frelsu.

Ellen fekk eina mynd frá Gudi at bera samkomuni í Føroyum. Hon sá ein risastóran eiturkopp, sum var blivin fóðraður í nógv ár. Eiturkoppurin er tekin uppá alskins ótta. Vit fylla okkara sinni við negativum tankum um okkum sjálv. Tað er ein av fíggindans hættum at halda okkum aftur – so vit ”stagnera”. Men Guds ætlan er at seta okkum í frælsi. Hann ynskir eitt lýðið fólk. Haraftrat nevndi Ellen, at Gud vil senda Sítt fólk út at boða evangeliið.

Hvat sita vit eftir við sum einstaklingar og sum samkoma? Hvat er tað Gud hevur tosað til okkara ígjøgnum hesi menniskju?

Óivað eru nógv gullkorn komin gjøgnum hesi vitjandi, og hevur Gud tosað ymiskt til okkum øll – hóast alt kann ein boðskapur heilt víst síggjast aftur hjá teimum øllum - Gerið tykkum til reiðar, latið Harran útrusta tykkum!

Ein heilsan við 1. Pætur. 5, 7-9: “Og kastið alla sorg tykkara á Hann! Tí hann hevur umsorgan fyri tykkum. Verið edrú, vakið! Mótstøðumaður tykkara, Djevulin, gongur um sum brølandi leyva og leitar eftir, hvørjum hann fær gloypt. Standið honum ímóti, føst í trúnni!
Tit vita jú, at hesar somu líðingar eru lagdar á brøður tykkara í heiminum.”

Mark. 16, 15: Hann segði við teir ” Farið út í allan heimin og prædikið evangeliið fyri øllum skapningum.”

# Skrá fyri juni/juli

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 8. juni | kl. 19.00: | Reach Out í Elduvík |
| Týsdagur | 9. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 13. juni | kl. 21.00: | AWAKE-kafé |
| Sunnudagur | 14. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg<br>Sangframførsla: Be Connected |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 15. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 16. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 20. juni | kl. 21.00: | AWAKE Gentu- og dreingjamøti<br>við Anju & Øyvind Bjerkenes |
| Sunnudagur | 21. juni | kl. 18.00: | Franklin Graham í Havn (sí meira undir Lýsingar) |
| | | kl. 21.30: | Franklin Graham í Havn (ung)<br>(einki morgunmøti er í Kelduni 21. juni) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 22. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 23. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 27. juni | kl. 21.00: | Felags ungdómsmøti í Lívsins Orð |
| Sunnudagur | 28. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku.<br>Ábyrgd: Rannvá Royðutoft.<br>Døgurði (sí meira undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 29. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 30. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 4. juli | kl. 21.00: | Felags AWAKE við Bjørgfinni Heinesen |
| Sunnudagur | 5. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku.<br>Ábyrgd: Pauli Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 6. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 7. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósadgur | 9. juli | kl. 20.00: | Felags ungdómsmøti í Soli Deo Gloria |
| Leygardagur | 11. juli | kl. 21.00: | Einki AWAKE |
| Sunnudagur | 12. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku.<br>Ábyrgd: Kaj O. Frederiksberg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 13. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 14. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 18. juli | kl. 21.00: | Felags AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 19. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku.<br>Ábyrgd: Ólavur Jacobsen |

# Lýsingar

**Franklin Graham vitjar**
Heimskendi evangelisturin Franklin Graham vitjar í Føroyum sunnudagin 21. juni. Franklin er sonur Billy Graham. Saman við honum kemur kendi gospelsangarin Michael W. Smith. Franklin Graham fer at hava tvey møti. kl. 18.00 og kl 21.30 (ætlað ungum). Møtini verða í hildin í Havn. Henda sunnudag er einki møti í Kelduni. Keldan er við til at skipa fyri møtunum saman við fleiri øðrum samkomum..

**Ungdómsmøtini í summar**
Í summar fara vit at royna nakað øðrvísi í samband við AWAKE. Vit fara at samstarva við Lívsins Orð, Soli Deo Gloria og Karis. Vit fara at skiftast um at hava ungdómsmøtir. Tvs., at tá vit hava ungdómsmøti, so hava tey onki, men koma til okkara, og tá tey hava ungdómsmøti, hava vit onki AWAKE, men skipa okkum og fara saman til teirra møtir. Hesi felags ungdómsmøtini byrja 27. juni, og enda við einari felags ungdómslegu í Kelduni í vikuskiftinum 14-16. august. Meiri kunning verður á Facebook og heimasíðuni.

**Døgurði sunnudagin 28. juni**
Døgurði verður at fáa til keyps sunnudagin 28 juni. Matarskrá: Høsnarungi, eplir, rís og sós. Ókeypis fyri børn i aldrinum 0-5 ár. 6-10 ár rinda 25 kr og 11 + rinda 50 kr. Tilmelding fer fram við at ringja/smsa til Marthu á tlf 269320 ella við at skriva tykkum upp við kunningardiskin. Freistin at melda seg til er týsdagin 23 juni.

**Kaféterian**
Kaféterian er opin hvørt mikukvøld frá kl. 17.00 til 20.00.

**Sunnudagsskúlin**
Sunnudagsskúlin hevur tørv á fólki eftir summaferiuna. Tørvur er bæði á bólkaleiðarum og hjálparfólki.
Í sunnudagsskúlanum eru vit fýra bólkar, ið hava sunnudagsskúlan tveir fylgjandi sunnudagar, og so eru uml. 6 sunnudagar til man eigur tørn aftur. Uppgávan hjá bólkaleiðaranum er at útdelegera uppgávur til tey, ið eru í bólkinum. Bólkarnir fáa tilfar til hvønn sunnudag frá sunnudagsskúlaleiðaranum. Meira fæst at vita frá Anniku Høj.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584